

*Tað gongur skeivan vegin við trivnaðinum í politinum*
Savnsmynd

# Politistar trívast illa

## Tað gongur afturá við trivnaðinumi politinum i Føroyum

Randi Jacobsen

Á hvørjum ár verður gjørd ein trivnaðarkanning í politinum í ríkinum. Kanningin verður gjørd øki fyri øki.

Í flestu økjum stendur betur og betur til hvørt ár við trinaðinum, meni einum øki gongur afturá, og tað er í Føroyum.

Politistarnir fáa fleiri spurningar at svara uppá. Svarini vísa, at á summum økjum eru gjørd framstig, men samanlagt gongur afturá við trivnaðinum, vísir úrslitið av kanningini.

Á einum øki stendur sambart kanningini serliga illa til á, og tað er viðvíkjandi samstarvi og samskifti.

Sambært keldum hjá Sosialinum eru tvær orsøkir til vánaliga trivnaðin. Onnur er bygnaðarbroytingarnar, sum hava ørkymlað starvsfólkini. Hin er avleiðingarnar av, at politistøðin í Havn er stongd vegna sopp. Soppurin hevur havt við sær, at deildirnar hava verið noyddar at flyta í fleiri ymisk høli í landinum.

Fyri alt ríkið er sum heilt galdandi, at kvinnurnar trívast betur enn menninir í politinum.

# Framvegis eingin ergoterapi

## Hóast Ergoterapeutfelagið og Heilsumálaráðið hava skrivað undir sáttmála, fáa børnini onga ergoterapi, tí privata ergoterapistovan letur ikki uppaftur

Randi Jacobsen

Í seinastu viku varð fyrsti privati sáttmáli undirskrivaður millum Ergoterapeutfelagið og Heilsumálaráðið.

Landsstýrismaðurin fegnaðist, og tað gjørdi felagið eisini.

Men tey foreldur, sum hava børn, ið tørvar ergoterapi, yppa øksl. Sáttmálin tryggjar ikki børnunum ergoterapi.

Einasta ergoterapistovan letur nevniliga ikki uppaftur. Tað segði Beinta Lassen, sum rekur ergoterapistovuna, við Rás2 fríggjadagin.

Hon sigur, at tá ið Heilsumálaráðið hevur boðað frá, at tað kemur eitt alment tilboð um ergoterapi, verður ikki grundarlag fyri privata tilboðnum eisini. Hon fer ikki at lata upp fyri at hava opið í nakrar krákumánaðir og so lata aftur eina ferð enn.



*Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður og Hanna á Reynatúgvu, forkvinna í Ergoterapeutfelagnum skrivaðu í seinastu viku undir sáttmálan, sum ikki í bræði fær nakran týdning*

### Mugu gera fyribilsloyn

Aksel V. Johannesen, táverandi landstýrismaður í heilsumálum segði við Rás2 sum svar upp á tað, at so má tað almenna tilboðið koma beinanvegin.

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður harmast, at privata ergoterapistovan ikki vil virka eftir sáttmálanum. Rætt er, at tað almenna ætlar at koma við einum tilboði, men tað tekur tíð at stápla eina skipan upp á beinini, sigur hann.

Hann væntar ikki, at tað verður trupult at gera eina almenna skipan, tí tað finnast fleiri dugnaligir ergoterapeutar í landinum.

- Um privata ergoterapistovan ikki vil lata upp aftur, noyðist tað almenna at finna eina fyribilsloysn fyri børnini, sigur Aksel V. Johannesen, sum í dag er farin frá sum heilsumálaráðharri fyri at gerast fíggjarmálaráðharri.

# Mælir til skúlasamstarv í Vágum

## Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna heitir inniliga á kommunurnar báðar í Vágum um at samstarva um skúlabygging

Randi Jacobsen

Nýggjur skúla skal byggjast í staðin fyri soppafongda skúlan á Giljanesi, men Helena Dam á Neystabø dámar einki, at Vága kommuna skal hava sín skúla og Sørvágs kommuna sín.

Landsstýriskvinnan hevur áður heitt á kommunurnar um at samstarva, og tað ger hon aftur nu. Mentamálaráðið kann ikki áleggja kommununum at samstarva um skúlabygging. Men landsstýriskvinnan hedur, at ein samskipan er til fyrimuns fyri allar partarnar bæði fíggjarliga og námsfrøðiliga.

Í seinastu viku sendi landsstýriskvinnan enn eina áheitan til kommunurnar í Vágum.

Vága kommuna hevur søkt Mentamálaráðið um at góðkenna ætlaðu skúlabyggingina á Giljanesi. Sambært byggikønum fólki hjá Landsverki er ætlaði skúlabygningurin nóg stórur til alla oynna.

Helena Dam á Neystabø bíðar við at geva loyvi til skúlabyggingina, til hon hevur kunnað landsstýrið. Samstundis vónar hon, at kommunurnar í Vágum vilja samstarva um skúlabygging.



*Soppafongdi skúlin á Giljanesi skal í øllum føri takast niður. Hann er so vánaligur, at tað loysir seg ikki at umvæla hann*